## VIÐMERKINGAR

# SEV - enn einaferð í andgletti

ARNSTEIN NICLASEN



– El- og orkufelagið er eitt fyrimyndarliga rikið lutafelag, sum allar kommunurnar í landinum kunnu vera ernar av. Við støðugari framleiðslu og við solidariskum, sambærligum og eins orkuprísum kring alt landið. Klárar SEV ikki nú at standa sína roynd við vaksandi mótstøðu frá landsmyndugleikum, ávísum "minnilutadiktaturi" og innanhýsis klandri, so býður felagnum ikki bøtur. So einfalt er tað, sigur Arnstein Niclasen, fyrrverandi býráðslimur í Havn

»Nei, tú,« segði ein kønur fróðarmaður nú ein dagin: »Vinnumálaráðið hevur ongan orkupolitikk - men hevur bara ein altráan negativan: anti-SEV-politikk!«

Hesin persónur er ikki hvør sum helst, so vit lata hesa útsøgn standa ómótsagda eitt bil.

Og millum aðrar døkkar vinir hjá interkommunala ljósbirtingarsamtakinum SEV koma bæði bløð og fjølmiðlarnir – helst við almenna-monopol-útvarpi Føroya á odda. Og hetta oftast í einum pálúnskum umhvørvishami. Tí tað er jú so tilforlátiligt.

Onkur ivast kanska í, um at hugtakið: umhvørvi bara fevnir um áir, fossar, gil, mýrar, blotar, hømiliur og deyðasinu? Men hvussu man t.d. arbeiðsumhvørvið vera hjá manningini hjá SEV, sum ofta ikki kann opna fyri tíðindunum ella lesa avísir, uttan at vænta sær eina særandi skolu? Man nakað annað arbeiðspláss í landinum fáa tílíka viðferð – og tað fyri almenna rokning?

### Søgan um SEV

Í bókini:"Orka og orkupolitikkur", sum allir løgtingslimirnir fingu til gávus undan viðgerðini um orkupolitikk í Tinginum í fjør, stendur nakað soleiðis:

"Søgan um SEV er søgan um stríð og strev, um andróður og tvídrátt millum manna, um andsøgn og tvørsøgn, millum kommunala felagskapin SEV, landsmyndugleikar og aðrar áhugabólkar .

Men søgan ber hinvegin eisini boð um eitt samfelt og málrættað strev og stev, um seigan og treystan róður, øksl móti øksl, fram móti stavnhaldinum: hetta at gróðurseta og menna okkara egna oyggjaland í fjarløgu frá meginlandsins fjálga veingjabreiði."

Hetta er eisini stavnhaldið, sum allir føroyingar innast inni taka undir við, so sum ætlað varð á minniliga jólafundinum í 1888: "- - at føroyingar skulu ganga fram í øllum lutum."

### Nýggjar tíðir

Omanfyri eru nevndir nakrir eksternir og loftnaðir vinir. Men nú er vent í holuni hjá SEV sambært stýrisformanninum. Tí nú er fíggindin eisini innangarðs.

Umboðsráðsformaðurin hevur stikni ella kompleksir mótvegis stjóranum og hevur fingið í part við sær ein hissini nýskipaðan meiriluta - við einum persóni í yvirvág - til at reka stjóra felagsins í tjøgnum 25 ár úr starvi. (Enn eitt dapurt dømi um veikleikan í tí "representativa" demokratinum.)

Men hvat er á vási, spyr tann vanligi brúkarin?

### Munur á monnum

Jú, vit mugu undrast á gongdina, sum minnast Hanus Joensen (á Heygnum), sála, fyrrverandi umboðsráðsformann, sum altíð gjørdi sítt ýtasta fyri altíð at hava gott arbeiðslag bæði mótvegis stjóra, stjórn, stýrið og innanfyri umboðsráðið. Og hann dugdi sera væl á røttum stað og tíma at seta vitigar og rannsakandi spurningar. Men hann var eyðsæð eisini góður við SEV.

Nú verða ófrættukendir fundir hildnir í umboðsráði og stýri við einum ella fleiri advokatum við lið. Ikki smávegis ferðalag. Og til hvat? At fáa frið í lag? Jamen, eru hesir - láturverjar lóganna og rættarins - altíð nóg reinir av hjarta til hetta? Mong ivast.

Nei, her er onkur ávísur, sum als ikki maktar sína uppgávu.

Løgfrøðin er vituliga góð til at tulka rættarvísindaligan tekst, men eru løgfrøðingar teir røttu at heita á, um orsøkin til trupulleikan eitt nú er av sálarfrøðiligum slag?

### Ein longri samansvørjing?

Ólag kann altíð komið í á hvørjari vælferð, men er her ikki heldur talan um eina "teimaða samansvørjing", sum grensar til rættiliga persónsforfylging? (Nakað fyri Amnesti?) Hetta spyr tann einfaldi brúkarin hjá SEV, og sum í sínum stilla sinni helst vil hava smærri rokningar fyri streymin, men sum gleðist yvir alla framgongd á elektroniska økinum, eitt nú at bløð og fjølmiðlar kunnu koma út regluliga við hjálp av støðugari orku – mest tí 100% kommunala elfelagsskapinum fyri at takka.

Ella er ólagið bara komið í av vanligari øvund, undirlutakenslu ella hugi til klandur? Ið als einki hevur við jura at gera!

Nú hoyrist frá elfelagnum, at umboðsformaðurin eftir vild fær tveitt bæði stjóra og stýrið á dyr av umboðsráðsfundi, og at "hondplukkaðir" advokatar mestsum yvirtaka dagsskránna. Og at útspillingin av stjóra, stjórn og stýri hevur rúmar ræsur.

### Ein miðaldarlig innrás?

Eisini undrar tað mangan, at umboðsráðsformaðurin gjørdist talsmaður fyri, at eingin sum arbeiddi hjá SEV kundi vera valdur inn í ella kundi virka í umboðsráðnum. "Teir eru ógegniðir, inhabilir" varð sagt(!). Men er hetta ikki ein grov diskriminering av ávísum fólkum, sum mangan vita meira um viðurskifti felagsins og samfelagsins sum heild - enn mong onnur, sum nærmast "av tilvild" verða vald í umboðsráðið?

Hetta stendur jú greitt í andsøgn við vanliga politikkin í øðrum stýrum og umboðsráðum, eitt nú í almenna Føroya Banka eru 7 stýrislimir og harav eru 2 starvsfólkaumboð og í Føroya Sparikassa eru 12 fólk í stýrinum og harímillum 4 starvsfólkaumboð. Er hetta hugtakið, sum annars er kent um lond sum "medarbejderindflydelse" púra kinesiskt fyri umboðsráðsformanninum og advokatum hansara?

Liggur hetta stásiliga slagskip kommununar nú bakk, sum ein forkrampað miðaldarlig danga, kend sum "óupplýst einaveldi", sum hesir nýggju makthavararnir í SEV ganga inn fyri?

Ella, ber nú til at spyrja, var hetta bara fyrsti liðurin í einari samansvørjing móti ávísum manni, fólkum ella fólkaferð?

Og fyri tað annað skuldi uppsagnarrætturin viðvíkjandi stjóranum endiliga flytast úr umboðsráðnum og yvir í stýrið, sum so - í tøkum tíma - kundi hava heimild til at siga stjóran úr starvi og tað við brestin. Og ikki umboðsráðið, sum annars á sinni hevur sett stjóran í starvið?

Umboðsráðið var helst ov tungt hjá ávísum at dansa við. Hetta fjølmenta forum sum so mangan hevur sett føtur í spenni, táið landsmyndugleikarnir, einstaklingar ella einstakir bólkar hava roynt at sláa egoistiska/politiska mynt av interkommunala felagsskapinum.

### Munur á stjórum.

Klæmint Weihe varð noyddur til at fara so hvørt úr stýrinum í Føroya Banka, Undirsjóartunnilsfelagnum og Smyril Line, sum hann var biðin um at koma upp í vegna hansara kendu kvalitetir sum leiðari og skilamaður. Hann hevði hvørki søkt hesar nevndarsessir ella "sleikt" seg politiskt fram til hesi álitisstørv.

Hetta var greið tala. Viðvíkjandi Klæminti, altso. Men hvussu er við stjóranum á ÚF?, og sum eg eisini havi stóra virðing fyri, sum ein av okkara bestu journalistum (eitt nú hansara sendingar í tøkum tíma um flogsøgu landsins). Han kann útmerkað væl muntra sær í nevndini í Føroya Banka, og síðani er hann eisini av landsstýrismanninum, Jógvani á Lakjuni, valdur til rættan monopolistiskan kringvarpsstjóra. Har er alt í lagið. Sig so tað!

Og hvussu við postverksstjóranum o.fl.. Hvar er teirra serliga innsikt í projekt og tunlar? Og soleiðis kundi verðið hildið fram við tí "betra slagnum" í almennu partafeløgum landsins.

Men kanska er talan bara um: politiskan lit, vinir ella kenningar har "middelmådigheitin" verður dyrkað, kunnu vit einfaldu kanska spyrja, alt meðan kongressin dansar og pinnamatar-brigadan durvar á maktini.

### Leiðarar og lagnur

Og hvørjar leiðarar vilja vit helst hava? Undirbrotlig hím? Anonymar kópakonur? Teir almennu høvdingarnar sært tú bara, táið okkurt gott er fyri góman fyri almenna rokning, ella táið búnin treingir til at luftast.

Tó hoyra vit eitt vet til kringvarpsstjóran, táið hann telur kúlur í V-4, og tað er bara gott at hoyra, at onkur av leiðarum landsins er frammi og hampiliga klárur, so kanska skuldi Klæmint bara gingið runt og tagt og kanska lisið elmálarar av? Tað hevði helst verðið sooo hyggeligt, ha?

Men tað ger hann ikki - enn. Todi Jónsson (flest mál í FCK) stendur heldur ikki við síðulinjuna og bíðar til at onkur hissini leggur ein bólt fyri føtur hansara.

Í bókini "Hugbirtingar" eftir Petur W. Háberg verður eisini sagt frá, hvussu teir " miðalmátigu" feldu meginslóðaran á telefon- og elútbyggingarleið landsins, Ólav av Heygum. Har stendur m.a. hetta:"Tað verður sagt, at táið sakførarin móti honum kom heim tann dagin, skuldi hann siga, orðarætt: " Nu fik vi ham – Færøernes klogeste mand!" " (Kennir nakar rákan aftur?)

### Alduorkuverkið

Sev hevur alla tíðina verið við til at kanna og royna alternativar orkuleiðir, so sum vatn, vind, sól og alduorku. Eitt dømi skal lýsast her.

Við bretsk/føroyska felagnum "SeWave" vóru lunnar lagdir undir eitt alduorkuverk við Nýpuna í Vágum, og sum helst skuldi verða eina "generatión" betri enn hitt heimskenda alduorkuverkið á Islay í Hebridunum. Hetta við initiativi frá SEV, og als ikki frá landsmyndugleikunum, fekst eitt hóskandi orkusamstarv í lag.

Men her sær ikki væl út. Tí her krevst vituliga neyv vitan og kunnleiki til alduorku, elorku, tekniskt enskt mál, men her máttu Klæmint og Kr. Fríðrik koyrast út úr nevnd alduorkuverksins. Og inn komu aðrir stýrislimir, sum valla duga meiri av enskum máli enn tað, sum stendur í kenda brotinum í ensku lesibókini í 1. klassa:" I can hop, I can run" (og gævi teir gjørdu tað).

Og hetta er vituliga í minna lagi, táið enskt er samskiftismálið á øllum fundum, referatum v.m., og hetta eyðsæð á einum tekniskum enskum máli á rættiliga høgum støði.

### Uppsagnarskriv til hoyringar

Hetta er eitt nýtt hugtak, sum ljóðar eitt sindur demokratiskt, men í roynd og veru ofta minnir ikki sørt um skoðiprocessirnar í Sovjet í 1937. Avgerðin er longu tikin, restin er sjónleikur og tøgn.

Ein torfør og lítið virðilig uppgáva. Hoyringarritið frá nýggja stýrismeirilutanum er turrgelt fyri jura, men rokað av tápiligum kenslum og kompleksum. Máliskan, mist álit, verður støðugt endurtikin. Advokaturin, sum helst er pennaførari, er ikki júst nakar stílmeistari. Men hetta er heldur ikki lætt. Soðið er tunt. Suppubótin er, sum huppur á haru. Og salerið fyri ómakin helst avmarkað.

Og so er heila kompleksherferðin, av advokati SEV-stjórans, so dyggiliga smasja yvir aftur um netið til: tann eina og teir fýra og superadvokatin.

### Nakað um Klæmint Weihe

Vit, sum hava starvast saman við Klæminti í áravís – bæði í umboðsráði, stýri og á annan hátt - kenna hann sum ein gløggan og ágrýtnan leiðara, sum er væl dámdur av starvsfólkum felagsins og sum dugir væl at samstarva við fólk. Vælhýrdur. Og so er hann fyrst og fremst góður við SEV.

Hann hevur sínar meiningar, sum saktans kunnu mýkjast, men sum heild eru tær væl undirbygdar við gløggskygni og sakligum argumentum. Og so er hann heldur ikki "til sølu" fyri ymiskar tilvildarligar fidus-politiskar-maktpersónar. Hvørki innan vinnu ella politikk.

Og hesum er vituliga ogn í, serliga í hesum døgum og fram til 2015, táið landið sambært løgmann skal teljast millum tey fremstu í heiminum.

### Hvør verður endin?

El- og orkufelagið er eitt fyrimyndarliga rikið lutafelag, sum allar kommunurnar í landinum kunnu vera ernar av. Við støðugari framleiðslu og við solidariskum, sambærligum og eins orkuprísum kring alt landið.

Klárar SEV ikki nú at standa sína roynd við vaksandi mótstøðu frá landsmyndugleikum, ávísum "minnilutadiktaturi" og innanhýsis klandri, so býður felagnum ikki bøtur. So einfalt er tað.

Roynt varð á sinni at tala fyri, at bara ein brennistøð bleiv bygd fyri alt landið, men tað læt seg ikki gera, m.a. av ávísum royndum við avtalusviki og vanligum sundurlyndi.

Sum nú er, hevur høvuðsstaðarkommunan, sum eftir fólkatalinum stendur fyri umleið 40% av búskaparligu skyldunum hjá SEV, bert eini 30% av ávirkanini í umboðsráðnum, og hevur henda størsta kommunan í landinum bara hevur 15% av ávirkanini í stýri felagsins.

Landspartarnir Sandoy (3%) og Suðuroy (10%) hava eisini 15% hvør (altso 30% íalt) av ávirkanini í stýrinum, og sum nú stevna fram á vandaleið við uppsøgn av stjóra og eftirfylgjandi órógvi.

### Hvussu við systemábyrgdini?

Endin kann tí lættliga verða, at felagið bera dettur sundur, og tá hevur Tórshavnar kommuna sínar stórdriftarfyrimunir umframt ein greitt avmarkaðan kundahóp. Ávísir partar av hinum kommunum í landinum hava ávísar fyrimunir eisini, men við væl størri rakstrarøki at røkja o.s.fr..

Aðrar kommunur verða heilt illa fyri, men tann vissi taparin í allari uppgerðini og frameftir verður vituliga útjaðarin og tann einstaki brúkarin. Lat tað vera púra greitt.

Og hvør verður tað tá, sum so skal taka sær av systemábyrgd samfelagsins á elorkuveitingarøkinum í ódnarveðri á degi og nátt? Hetta er ein annar átroðkandi spurningur, sum kommunurnar - og ikki landsmyndugleikarnir - sjálvbodnar hava tikið á seg nú hesa seinastu hálvu øldina. Men lætt verður tað ikki.

Og langt, langt av leið er aðalmálið skotið: "At føroyingar skulu ganga fram í øllum lutum!"